## Færri sjórán í desember

Hóast royndirnar hava verið nógvar, so blivu bert tvey skip rænd í farna mánaði. Fleiri lond hava sent skip og tyrlur at ansa eftir har um leiðir, og tað hevur víst seg at hjálpa ímóti sjórænarunum. Tað merkir tó ikki, at teir eru burturi, tí á ársins fyrsta degi varð eitt egyptiskt skip rænt og siglt til somalsku strondina, har manning og skip helst verða afturhildin, inntil sjórænararnir hava fingið pengar fyri at lata tey leys aftur. Í 2008 vóru fleiri enn 100 álop frá sjórænarum uttan fyri Somalia. 42 skip vórðu tikin og burturflutt, og av teimum verða 14 framvegis hildin gíslar.

## Eingin neyðhjálp til Gaza

Ísrael hevur nú latið Gazageiran upp, men bert fyri at útlendingar sleppa úr landinum. Eingin sleppur inn, sjálvt ikki teir neyðhjálparfelagsskapir, sum eru klárir við neyðhjálp. Fleiri felagsskapir eru stand-by, og bíða bert eftir innferðarloyvi í Gaza. Ì morgun rakti eitt ísraelskt luftálop 15 hús, eftir sætta náttarálopið á rað. Higartil eru minst 417 palestinensar deyðir og yvir 2000 særdir. Teimum vantar vant og mat, og torført er at geva øllum neyðuga læknahjálp. Teimum tørvar heilivág, gass og el, og fyri mong er støðan eins hættislig, sum sjálv bumbuálopini.

# Broytt FAS-skipan skapar møguleikar

**- Tað skal meira enn eitt føroyskt flagg á hekkuna fyri at skapa eina sjóvinnu. Allar fyritreytir eru til staðar at reka veruligt reiðarí/shipping-virksemi í Føroyum – men allir partar í vinnuni mugu stimbra hesi tilgongd, heldur felagið hjá navigatørum**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Avgerandi fyri føroyska farmaskipaflotan er, at kappingarførið hjá okkum er líka gott sum hjá feløgum í okkara grannalondunum. Broytingar, sum nú eru samtyktar og koma í gildi nú 1. januar 2009, skuldu gjørt okkara skipan kappingarføra. Sjómenn undir FAS koma at gjalda 35% í skatti, og reiðaríini fáa 35% í afturbering.

Á aðalfundi hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag segði Eyðstein Djurhuus, formaður, at uppgávan hjá Føroyum verður at tryggja, at lønarlagið í eini føroyskari FAS-skipan ikki verður verri enn aðrastaðni.

- Tá hýrur verða samanbornar við hýrur í øðrum londum, má havast í huga, at lønarlagið sum heild er munandi hægri í Noregi og Danmark enn hjá okkum. Eisini er stórur munur í inntøkumøguleikunum hjá teimum ymisku skipabólkunum, og lønarspreiðingin er rættiliga stór.

Eyðstein vísti á, at individuellir sáttmálar eisini verða brúktir, har hvør einstakur samráðist um sína løn.

Hetta merkir, segði formaðurin, at sáttmálalønin er eitt slag av minstuløn.

- Søfartens Ledere hevur gjørt ein lønarstatistikk yvir lønarlagið, og hesin staðfestir, at stórur munur er millum inntøkur fyri sama starv.



Eyðstein segði, at við føroyskum farmaskipum fáa flestu navigatørar meira enn sáttmálaløn.

- Vit hava einki ímóti at goldið verður meiri í hýru, men neyðugt er at fylgja væl við, at alt ov stórur munur ikki er millum persónar, sum gera sama arbeiði, legði hann aftrat.

### Føroyskt flagg

Nú inntøkurnar hjá landshúsarhaldinum eru nógv minkaðar, serliga orsakað av minkandi fiskiskapi, er politiskur vilji til, at nýggjar inntøkur skulu koma frá eini kappingarførari FAS skipan.

- Um hetta fer at eydnast, fáa føroyskir sjómenn fleiri vinnumøguleikar. FSN vil á allan hátt viðvirka til, at hetta skal eydnast. Tó vilja vit ávarða ímóti, at allar hurðar verða latnar upp á víðan vegg. Tíverri vita vit, at nógvir óseriøsir luttakarar eru í altjóða sjóvinnu.

Formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag legði dent á, at tað skal meira enn eitt føroykst flagg á hekkuna fyri at skapa eina sjóvinnu.

- Allar fyritreytir eru til staðar at reka veruligt reiðarí/shippingvirksemi í Føroyum – og allir partar í vinnuni mugu stimbra hesi tilgongd, segði Eyðstein Djurhuus.



*Jógvan Fagraklett, formaður í FFU*

## Kollfirðingur heldur fram

**Eins og Fiskimannafelagið og Føroya Skipara-og Navigatørfelag, helt Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands eisini aðalfund millum jóla og nýggjárs**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

FFU, sum er felagið hjá føroyskum fiskimonnum uttanlands, er væl nøgt við uppmøtingina til aðalfundin, sum felagið helt millum jóla-og nýggjárshalguna.

Nevndin, sum sat undan fundinum, heldur fram, og tað ger formaðurin, Jógvan Fagraklett úr Kollafirði, eisini.

Soleiðis verður tað kollfirðingur, sum kemur at standa á odda fyri felagnum – eisini í árinum, sum júst er byrjað.

Næstformaður í nevndini er Høgni W. Høgnesen á Toftum.

### Gevandi fundur

Næstformaðurin sigur í stuttorðaðum tíðindaskrivi, at fleiri mál vórðu viðgjørd á aðalfundinum, og millum hesi var samdøgursfrádrátturin, sum fekk eina gjølliga viðgerð.

- Enn eru snávingarsteinar, sum skulu ruddast burtur í hesum máli, sigur hann.

Høgni W. Høgnesen sigur, at føroyskir fiskimenn uttanlands høvdu ein góðan og gevandi aðalfund.

# Vilja hava lægri yvirmannapartar

**Reiðarar á línuskipum hava ógvuliga ilt við at góðtaka, at yvirmannapartarnir eru nógv hægri hjá teimum enn hjá øðrum skipabólkum. Tí vilja teir hava broytingar í sáttmálanum, nú samráðingar eru við felagið hjá navigatørum**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Reiðarafelag hevur sagt upp sáttmála og sersáttmálar fyri einstøku skipabólkarnar, sum felagið hevur við Føroya Skipara-og Navigatørfelag. Sáttmálarnir eru sagdir upp til at fara úr gildi 1. januar í ár – 2009.

Sáttmálin millum Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið gekk út 1. desember í 2008, og eftir samráðingar í nakrar dagar samdust feløgini um at leingja sáttmálan óbroyttan í eitt ár.

Á aðalfundi í Føroya Skipara-og Navigatørfelag týsdagin segði formaðurin, Eyðstein Djurhuus, seg ikki rokna við teimum stóru broytingunum fyri sínar limir, nú felag hansara er í samráðingum við reiðararnar.

- Reiðarafelagið ynskir onkrar broytingar fyri skipararar á línuskipum, og vit hava boðað frá, at vit eru sinnaðir at tosa um hetta.

Eyðstein segði, at skal nakað gerast í sátt og semju millum partarnar, verður talan ikki um nakra kollveltandi broyting, sum hann tók til.

- Reiðarar á línuskipum hava ógvuliga ilt við at góðtaka, at yvirmannapartarnir eru nógv hægri hjá teimum enn hjá øðrum skipabólkum. Tillagingar eru gjørdar í línuskipasáttmálanum í fleiri umførum seinastu árini, men av ringum royndum veit FSN, at tað ikki loysir seg at vísa øllum krøvum frá sær og ikki vilja tosa um viðurskiftini.

Eyðstein Djurhuus helt fyri, at í løtuni ber ikki til at siga, hvat úrslitið verður av samráðingunum millum partarnar, nú samráðingarnar við Reiðarafelagið verða tiknar uppaftur.

- Men vit vænta tó ongar kollveltandi broytingar, endurtekur hann.